Brandur bergtók íslendingar

Túsundtals fólk hoyrdu mánadagin Brandur Enni spæla og syngja í Íslandi. Fólk sýna stóran áhuga fyri føroyska unglinginum

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Mánadagin framførdi Brandur Enni í sambandi við tjóðardagin hjá íslendingum. Brandur var á palli bæði í Reykjavík og á Hafnafirði, og á báðum støðum eydnaðist tað sera væl hjá 13 ára gamla tvøradronginum.

– Móttøkan hevur verið sera góð. Vit høvdu ikki væntað, at fólk fóru at sýna so stóran áhuga fyri Brandi, tí tónleikurin av fløguni hevur ikki verið so nógv spældur heryviri undan hesum framførslunum, sigur Steintór Rasmussen, sum førir Brandur fram í Íslandi.

– Men tað vísti, at Brandur gekk reint hjá íslendingum, og aftaná hava fólk tráðspurt eftir fløguni hjá honum.

Her lurtaðu eini 8000 fólk ta løtuna, tá Brandur var á pallinum. Seinna mánakvøldið var Brandur á palli í Hafnafirði, har ein onnur útikonsert varð hildin, og her vóru eini 2000 fólk til konsertina.

– Vit høvdu ikki roknað við tí stóra í Hafnafirði, eftir at vit høvdu verið til stóru konsertina í Reykjavík, men vit vóru ovfarin av áhuganum har. Brandur slapp næstan ikki avstað aftur úr Hafnafirði, eftir at hann hevði verið framført, sigur Steintór Rasmussen.

Hann roknar við, at tað ber til at selja fitt av fløgum við Brandi Enni eftir framførslurnar mánadagin, og nú skulu Steintór og íslendingar finna út av, hvussu fløgan skal breiðast út í Íslandi.

Tvær konsertir

Brandur Enni spældi seinnapartin mánadagin á útikonsert í Reykjavík.

Norðmaður fluttur av trolara á sjúkrahús

Sunnudagin varð bjargingartyrlan hjá Atlantic Airways boðsend, tá ein norskur sjómaður datt og meiddi seg illa

BJARGING
Stefan í Skorini

Tað var umborð á skipinum Oybard, at ein av manningini datt niður í lastina og fekk støran skaða. Tyrlan var stødd í Koltri, tá MRCC-støðin sendi boð eftir henni. Farið varð úr Koltri vestur í Vágar eftir bjargingarmanning. Umleið klokkan fimm var tyrlan hjá norska skipinum Oybard einar 58 fjórðingar í ein landnyrðing úr Føroyum.

Bjargingarmaður varð loraður niður á skipið og fekk sjúklingin á børu, áðrenn hann var hivaður upp í tyrluna. Klokkan var 18.19, tá tyrlan lendi á pallinum við Landssjúkrahúsið í Havn.

Fríggjadagin var bjargingartyrlan úti í Tindhólmi eftir einum manni, sum hevði meitt sær beinið. Hann varð fluttur á Landssjúkrahúsið.

Déjà vu heiðurligt úrslit í Grená

Tónleikabólkurin Déjà vu úr Havn endaði á øðrum plássi í eini Grand Prix kapping í danska býnum Grená. Bólkurin var ógvuliga nær við at røkka øðrum plássi

TÓNLEIKUR
Stefan í Skorini

Déjà vu fekk eitt heiðurligt úrslit í tónleikakapping í Danmark. Bólkurin gjørdist nummar tvey og var bert trý stig aftanfyri ovasta bólkin

Mynd: Finnur Justinussen

Næstseinasta fríggjadag var føroyski bólkurin Déjà vu við í einum amatør Grand Prix í Grená. Nú er úrslitið greitt, og ungu menninir úr Havn endaðu á øðrum plássi.

Teir iðra seg tó um, at tað ikki gekk enn betri, tí teir vóru ógvuliga nær við. Teir triggir dómararnir góvu Déjà vu 125 stig, meðan vinnandi bólkurin fekk 128 stig. Møguleiki var at fáa 150 stig tilsamans. Um pallframførslan hevði verið betri, kundi bólkurin kanska tikið fyrsta plássið.

Annars eru teir sera væl nøgdir við túrin sum heild, tí alt eydnaðist væl. Bólkurin spældi eisini á eini kafé eitt kvøldið, og hetta riggaði eisini væl.

Spæla longu aftur

Hóast bólkurin júst er afturkomin av ferðini, so verður hann aftur at síggja á palli hóskvøldið. Tá fer bólkurin at framføra í Club 20.

Við á ferðini í Danmark vóru Líggjas Olsen, sum syngur og situr við tangentarnar. Hann hevur áður sungið við bólkinum Diatribes. Flóvin E. Viderø syngur og spælir gittar, Rúni W. Højgaard spælir trummur, Heri Reynheim, sum fyrr hevur spælt við Diatribes, er á bassinum og Rói Christiansen, sum enn spælir við Tangz, spælir gittar. Rógvi Rasmussen er fastur bassspælari, men hann er í Danmark á skúla, og tí hevur Heri Reynheim loyst hann av.

Bólkurin vil annars nýta høvi at takka Norðurlandahúsinum og Atlantic Airways og lýsarum sínum.

30 fráferðir úr Føroyum

Atlantic Airways fer nú undir summarferðaætlanina, og tað inniber, at heili 30 fráferðir vera úr Føroyum hvørja viku. Sum nakað nýtt verður nú eisini flogið til Oslo

FLOGFERÐSLA
Stefan í Skorini

Tann 17. juni verður farið undir summarferðaætlanina hjá Atlantic Airways, og felagið fer at hava 30 fráferðir úr Føroyum um vikuna til 18. august, tá summarferðaætlanin endar.

– Ferðahugurin er framvegis stórur í Føroyum, og áhugin fyri Føroyum sum ferðamáli er eisini í menning. Nakað av vøkstri hevur verið í ferðsluni í ár, og útlit eru fyri hampuligari stórari summarferðslu í ár, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantic Airways.

Nýggja ferðamálið í ár er Oslo. Atlantic fer at flúgva tvær ferðir um vikuna til norska høvuðsstaðin. Mikudag gongur leiðin úr Vágum umvegis Stavanger til Oslo, og somuleiðis verður flogið umvegis Stavanger heimaftur. Leygardag flýgur Atlantic beinleiðis millum Vágarnar og Oslo.

– Tað vísir seg, at ferðslan til og frá Noregi spjaðir seg um alt landið, og Gardermoen flogvøllurin í Oslo er knútapunktið fyri innanríkis flogferðslu í Noregi. Tí halda vit, at vit tæna ferðafólkinum best við at flúgva til Gardermoen. Vit hava kortini ikki slept Stavanger, tí vit vóna framvegis, at meiri oljuvirksemi fer at taka seg upp millum Føroyar og Noreg, sigur Magni Arge.

Tvær ferðir Keypmannahavn

Atlantic fer at flúgva til Keypmannahavn tvær ferðir um dagin í summar. Mánadag og fríggjadag eru eykatúrar, so at hesar dagarnar eru tríggir túrar um dagin. Talið av fráferðum til Billund er økt úr trimum upp í fýra fráferðir. Flogið verður til Billund týsdag, hósdag, leygardag og sunnudag.

Eisini London hevur fingið eina fráferð afturat. Flogið verður til London hósdag og sunnudag. Til Aberdeen verður flogið mánadag, mikudag og hósdag.

Samband er til Reykjavíkar fýra ferðir um vikuna mánadag, mikudag, fríggjadag og sunnudag.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Pedagogur og hjálparfólk til Dagstovnin i Øksnagerði

Tórshavar kommuna søkir eftir pedagogi og hjálparfólki til Dagstovnin í Øksnagerði.

Størvini
Talan er um tvey størv í smábarnastovuni:
- 1 starv 40 tímar um vikuna sum pedagogur
- 1 starv 40 tímar um vikuna fyri hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi

Stovnslýsing
Dagstovnurin í Øksnagerði er normeraður til 40 barnagarðsbørn, 18 2-3 ára gomul børn umframt eina stovu við 10 plássum fyri børn við serligum tørvi.

Vit bjóða
tvey áhugaverð størv, har tit saman við leiðaranum og starvsfólkunum fáa møguleika fyri at seta tykkara dám á stovnin. Vit eru ein nýggjur stovnur, ið lat upp 2001. Stovurnar eru góðar og rúmligar. Vit hava útbúgvið fólk í øllum stovum. Dentur verður lagdur á at byggja eina mentan upp, og ætlanin er at gera eina endamálsorðing fyri stovnin, - og vit eru opin fyri hugskotum. Á stovninum eru uml. 19 starvsfólk.

Vit ynskja
at umsøkjarin
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur hugsjónir og torir at siga sína hugsan
- luttekur og mennir tað pedagogiska arbeiðið
- dugir væl at samskifta við børn, foreldur, starvsfólk og onnur

Setanarviðurskifti
Størvini verða sett 15. august 2002 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Meiri fæst at vita
um størvini við at venda sær til Jesper Roos Nielsen, leiðara, tlf. 319959, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

Umsókn
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerði 1, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 6. juli 2002.

SNARSKIVAN

Stór sethús til

Eini stór og góð sethús í forsk
hæddum á Gerðisvegi 11 í Søldarfi
sølu. Húsini eru bygd í 1982. Í h
eru baðirúm, hjúnarúm, 3 kømur, k
stova, gongd, durur, vaskirúm og
stór rúm, sum ikki eru innrætta
Harafturat er kjallari.

Boð undir 925.000 kr. ongan áhu

Tlf. 44 20 86, 26 56 47 ella 25 13

Útbjóðing

Hervið verður arbeiðið at sópa vegir og økir í Vestmanna Kommunu boðið alment út.

Allir almennir vegir og øll almenn øki skulu sópast við maskinu tvær ferðir um mánaðin í tíðarskeiðinum frá 1. apríl til 30. november, og einaferð um mánaðin í tíðarskeiðinum frá 1. desember til 31. mars.
Vegbrunnar, vatnfang o.l. skulu tømast tvær ferðir árliga.

Afturat omanfyri standandi skal gevast tilboð uppá tímatakst, um neyðugt verður at sópa uttanfyri avtalaðar tíðir.

Teir bjóðandi skulu sjálvir seta seg inn viðurskiftini á staðnum.

Møgulig tilboð skulu vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi týsdagin 2. juli.

Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til at velja ímillum innkomin tilboð, ella einki tilboð at velja.

Vestmanna Kommuna

Tann nýggja Nokia 3410

Einans kr. 1.790,-

Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

Gott stevnubingo
verður í bygdarhúsinum í Hósvík
mikudagin 19. juni kl. 19.00

Nógvir góðir vinningar m.a. á lutaseðli:

10 lutir á lutaseðli:
Ferð fyri tvey við bili í tveykoyggjukamari til Bergen við Norrønu
Gávubræv døgurðamatur frá MBM laksur
Fløguspælari til bil o.m.a

Full pláta - gávukort á 400 kr. frá Inn
Tó 6 spæl gávukort á 500 kr. Nógvur døgurðamatur frá MBM og Fototól virði á 1.895 kr. og nógv annað gott

Øll eru vælkomin
Hósvíkar Róðrarfelag
&
Bygdarfelagið Varðin

Lærarastarv í Stranda skúla

Stranda skúli søkir eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2002/2003 í 24 t/v. Starvið er fyri lærarar á skeið. Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum fyri Stranda skúla í hendi seinast 26. juni 2002 kl. 18.

Nærri upplýsingar fáast frá skúlastjóranum, telefon 447955.

Skúlastýrið fyri Stranda skúla
v/ Súna Kristiansen
480 Skála

Golf IV 1.8

125 HK, 3/99, 38.000 km, 18" Alu og 15" stál hjól og CD-spælari eru við. Bilurin stendur hjá Bilasøluni v/ Øssur Johannesen.

Tlf. 218020

Hósvíkar Skúli

Søkt verður eftir einum lærara í tíðaravmarkað starv at lesa uml. 23 tímar um vikuna skúlaárið 2002/2003.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 422259 ella 422526.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi hin 26. juni 2002.

Skúlastýrið fyri Hósvíkar Skúla
v/ Adolf Johannessen
420 Hósvík